VIÐMERKINGAR

# Skert umsorganararbeiði

**Frá Javna**

Seinastu dagarnar hava fjølmiðlarnir borið tíðindi um, at játtanin til umsorganararbeiði er skert mundandi. Millum annað rakar tað dagtilhaldini fyri eldri meint, við tað at fíggjarliga grundarlagið mestsum verður rykt undan teimum. Tøkk skulu tíðindafólk hava fyri at taka hetta álvarsmál upp.

Í hesum sambandi hevur verið nevnt, at tað eru 5 dagtilhald í landinum. Her má Javni tó gera vart við, at dagtilhaldini eru fleiri enn so. Á Hoydalsvegi 40 er eitt dagtilhald fyri gomul fólk við menningartarni. Har er eisini ein frítíðarklubbi fyri ung við menningartarni - nakað sum Margarinfabrikkin. Slíkir frítíðarklubbar eru í hvussu er eisini í Eysturoy og í Klaksvík, møguliga aðrastaðni eisini. Og tilsvarandi tiltøk eru eisini fyri sinnisveik. Hesi ungu eru jú ikki før fyri at taka lut í øllum tí ungdóms- og frítíðarvirksemi, sum stendur øðrum í boði. Øll hesi tiltøk eru nú so skerd fíggjarliga, at vandi er fyri, at tey detta niðurfyri. Og tað verður svárur missur hjá mongum.

Dagtilhaldið fyri eldri menningartarnað hevur sera stóran týdning, tí hesi menningartarnaðu hava lítið annað at koma út til. Tey eiga hvørki børn ella barnabørn at vitja - og foreldrini eru farin undir grønutorvu. Í góðum árum hava tey ikki komið nógv út í "normalsamfelagið", og á gamalsaldri eru tey ikki før fyri at fara í eitt "alment" dagtilhald. Í dagtilhaldinum á Hoydalsvegi 40 koma 8 fólk fast 4 tímar um dagin og onkur parttíð umframt styttri vitjanir. Hetta er hjá flestu teirra einasta tiltakið, ið fær tey út um dyr, og tey hava ikki onnur tiltøk at fara til.

Vit eiga at hava í huga, at tá fólk við menningartarni verða 67, eru tey ikki longur avlamispensjónistar men fólkapensjónistar. Tey eiga at fáa javnbjóðis møguleikar sum aðrir fólkapensjónistar. Men samstundis eiga vit at minnast til, at tey eru framvegis menningartarnað.

Tað er gleðiligt at síggja í bløðunum, at Hans Pauli Strøm, almannaráðharri, verður endurgivin fyri at siga, at henda skerjing ikki kann góðtakast, og at tað skal finnast ein loysn. Tað verða mong glað fyri.

Javni má tí minna á, at eisini dagtilhaldini og frítíðartilboðini til menningartarnað, bæði yngri og eldri, mugu fáa eina hóskandi loysn, soleiðis at vit framhaldandi kunnu geva okkara menningartarnaðu virðilig lívskor.




# Kredittráðgevi til peningastovn í vøkstri

Kredittdeild okkara sóknast eftir einum nýggjum kredittráðgeva til eitt avbjóðandi starv í einum peningastovni við hugsjónum og málum innan kredittøkið.

Kredittdeildin hevur ábyrgdina av, at kredittøkið í Sparikassanum verður umsitið forsvarligt og lønandi.

Vit ynskja okkum ein virknan og fakliga tryggan starvsfelaga, ið bæði megnar at arbeiða sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur á kredittdeildini eins og í samtaki Sparikassans.

Føroya Sparikassi stendur í vøkstri, og tí broytast uppgávur, eins og fleiri leggjast afturat. Arbeiðið er fjøltáttað og setur krøv til samstarvshug, samskiftisevni, hugskotsríkidømi og eginleikan at taka avgerðir. Leiðin frá góðum hugskotum til veruleika er stutt.

Uppgávurnar hjá kredittráðgevanum eru t.d.:

· Lánsaksviðgerð
· Uppfylging og gjøgnumgongd av kundaviðurskiftum
· Sundurgreiningar av roknskapum, útlánum og vinnugreinum
· Arbeiði við kredittpolitikki, virkisgongdum og leiðreglum innan kredittøkið
· Áhaldandi menning av kredittøkinum

Nýggi kredittráðgevi okkara eigur at hava hóskandi útbúgving t.d. HA, HD ella líknandi, men fólk við øðrum viðkomandi útbúgvingum eru eisini vælkomin at søkja starvið. Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg bæði fakliga og persónliga.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, telefon 348510 ella við telduposti til: marjun.eystberg@sparikassin.fo og/ella Boga Bendtsen, undirstjóra og leiðara á kredittdeildini, telefon 348520 ella við telduposti til: bogi.bendtsen@sparikassin.fo

Skrivlig umsókn skal verða Sparikassanum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 18. juli 2005.

Send umsóknina til:
FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Postboks 34, Yviri við Strond 2
FO-110 Tórshavn

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 171 fólk á 16 privatkundadeildum og tveimum vinnukundadeildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á kredittdeildini, Yviri við Strond 2, starvast átta fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI


# Eingin venjing – eingin sparing

**Føroyskir Fysioterapeutar og Ergoterapeutfelagið**

Sparingar innan almannaverkið fara at hava við sær, at venjingartilboðini hjá fysio- og ergoterapeuti, sum heimabúgvandi pensionistar í Tórshavn hava havt atgongd til síðan 2002, nú verða spard burtur.

Feløgini Føroyskir Fysioterapeutar og Ergoterapeutfelagið gera við hesum vart við, at hesar sparingar ikki eru so frægt sum løtuvinningur. Tvørturímóti fara sparingarnar at hava við sær tyngri brúkarar í heimarøkt, heilsuverki og røktarheimum í nærmastu framtíð.

Tey eldri verða alt fleiri og eldri í mun til fólkatalið og nógv teirra liva leingi við kroniskum sjúkum og brekum. Nógvar kanningar eru gjørdar um nyttuna av venjing til hesi og allar vísa tær, at venjing ger, at tey klára seg betri uttan hjálp, tey verða minni røktarkrevjandi og teirra lívsgóðska hækkar so tey fáa ein betri dagligdag í allar mátar.

Í okkara grannalondum er venjing tí ein tænasta, sum dentur verður lagdur á at veita øllum heimabúgvandi eldri. Samanborið við okkara grannalond, eru Føroyar í stóran mun eftirbátar innan venjingartilboð til eldri. Tilboðini um venjing, sum Lágargarður bjóðar eldri borgarum í Tórshavn hava tó verið ein byrjan.

Við at at skera hesi venjingartilboð burtur, verður kostnaðurin innan eldraøkið størri. Tvs. at kostnaðurin fyri venjingatilboð fellur burtur og verður fluttur yvir á meira røktarkrevjandi brúkarar av heimahjálp, sjúkrahúsplássum og røktarheimsplássum.

Vit heita tí á landsins myndugleikar um at forða fyri at hesar skerjingar verða framdar og í staðin at arbeiða miðvíst fram ímóti at tryggja øllum landsins eldri borgarum atgongd til venjing.


